# Bjørn er væl nøgdur við føroyska leiklutin í sildasamráðingunum



*- Tað hevur havt týdning í samráðingunum, at vit gingu væl um sildina, meðan eingin avtala var, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, sum rósar sínum samráðingarfólkum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**– Okkara partur er umleið tann sami, sum vit fiskaðu í árinum, sum fór, tá ið vit ásettu okkara egnu kvotu, tí strandalondini vóru ikki samd um býtið av norðhavssildini, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum**

SAMRÁÐINGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Samráðingarnar um norðhavssildina, sum seinastu dagarnar hava verið í norska høvuðsstaðnum Oslo, hava verið á embætismannastigi, og samráðingarleiðari í føroysku sendinevndini hevur verið Kate Sanderson, sum starvast í Fiskimálaráðnum. Umframt aðrar embætismenn, sum hon hevur havt við sær á ferðini í Noregi, hava eisini verið fiskifrøðingar og umboð fyri føroysku sildaskipini við í ferðalagnum.

Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, hevur ikki verið við sjálvur, tí samráðingarnar hesaferð vóru á embætismannastigi, men samráðingarfólkini hava javnan verið í samband við, tá ið ivamál tóku seg upp undir samráðingunum.

## Rós til umboðini

– Eg eri stak væl nøgdur við føroyska leiklutin í hesum samráðingunum, og tað geldir fólkini hjá okkum í Fiskimálaráðnum, fiskifrøðingar og umboðini fyri skipini.

Bjørn sigur, at politiskt hevur nógv verið tosað aftur og fram millum londini, men áðrenn samráðingarfundir í Oslo byrjaðu, var eingin avtala um norðhavssildina.

– Nú avtalan er undirskrivað, haldi eg, at vit fingu tað burtur úr, sum vit undir verandi umstøðum kundu vænta okkum.

Landsstýrismaðurin sigur, at tey 5,16%, sum gjørdist okkara partur av eini samlaðari kvotu upp á 1.280.000 tons, er á leið tann sami, sum vit veiddu av norðhavssild í árinum, sum fór.

– Okkara partur í gamla býtinum var 5,46%, men í realitetinum eftir ymiskar flytingar bert 5,31% og parturin, sum okkum varð tillutaður hesaferð, er 5,16%, sigur hann.

Bjørn Kalsø sigur, at tey stivliga 66.000 tonsini av norðhavssild, sum vit kunnu veiða í ár, er umleið sama nøgd, sum vit veiddu eftir kvotu, vit sjálvi høvdu ásett fyri 2006.

– Munurin í ár verður so, at vit kunnu fiska 39.000 tons av okkara sildakvotu í norskum sjógvi, og tað kundu vit ikki, meðan eingin avtala var millum strandalondini, sigur hann.



*Nú kunnu skipini aftur fiska norðhavssild - undir skipaðum viðurskiftum millum strandalondini*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Gamla mynstrið

Landsstýrismaðurin fegnast um tær ábendingar, sum siga, at norðhavssildin er farin at taka gamla ferðamynstrið uppaftur.

– Vit hava seinastu árini sæð ábendingar um hetta, og tað kann í longdini merkja, at vit í framtíðini – av røttum – kunnu krevja ein størri prosentpart av heildarkvotuni.

Hann sigur, at norðhavssildin stendur longri í føroyskum og íslendskum sjógvi um veturin, enn hon gjørdi áður, og seinastu árini hava eisini víst, at sildin ikki í sama mun sum áður stendur inni á norskum firðum, sum hon gjørdi.

– Haraftrat kemur, at tað eru broytingar í sjóvarhitanum, sum benda á, at umstøðurnar her um okkara leiðir eru farnar at líkjast meira umstøðunum, sum vóru, tá ið sildin ein størri part av árinum stóð her um okkara leiðir, sigur landsstýrismaðurin.

Bjørn Kalsø sigur, at í Fiskimálaráðnum eru tey bjartskygd um, at norðhavssildin, sum árini ganga, fer at taka uppaftur sítt gamla ferðamynstur, og tað er serliga við føroyska kvotapartinum fyri eyga, at hetta kann fáa stóran týdning fyri okkum.

– Nú vóna vit bara, at tann gongd, sum hevur víst seg seinastu árini, fer at halda fram, sigur landsstýrismaðurin.

# Norðhavssildin aftur undir skipaðum viðurskiftum

**Tað var Noreg, sum í 2006 sýtti fyri at endurnýggja táverandi avtalu, men tey fyrstu árini eftir hetta, hildu strandalondini seg meira ella minni til gomlu heildarkvotuna og býtið. Men seinastu fýra árini ella so hava strandalond ásett sína egnu kvotu, og vandi hevur tískil verið fyri, at óskipaða veiðan kundi fara at ganga útyvir sildastovnin**

SAMRÁÐINGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Strandalondini, sum varða av norðhavssildini, eru umsíðir komin ásamt um býtið av sildini, og eisini eru londini vorðin samd um heildarkvotuna fyri 2007, sum er sambært tilmælinum hjá ICES.

Semjan millum londini er undirskrivað í norska høvuðsstaðnum í morgun eftir samráðingar á embætismannastigi seinastu dagarnar.

Semjan millum londini merkir, at norðhavssildin nú aftur er komin undir skipaði viðurskifti, eftir at eingin felags avtala hevur verið um stovnin seinastu árini.

## Felags avtala

Tað var Noreg, sum í 1996 sýtti fyri at endurnýggja táverandi avtalu, men tey fyrstu árini eftir hetta, hildu strandalondini seg meira ella minni til gomlu heildarkvotuna og býtið.

Seinastu fýra árini ella so hava strandalond ásett sína egnu kvotu, og vandi hevur tískil verið fyri, at óskipaða veiðan kundi fara at ganga útyvir sildastovnin.

Nú er so endaliga komið á mál eftir ósemju og drúgvar samráðingar, og norðhavssildin verður aftur veidd undir skipaðum viðurskiftum, sum í longdini kemur at tæna øllum pørtum best.

Heildarkvotan, sum strandalondini samdust um fyri 2007, er 1.280.000 tons, samsvarandi tilmælinum hjá ICES.

Av hesum fáa Føroyar 5,16%, sum gevur okkum stivliga 66.000 tons av norðhavssild, og tað er umleið tað sama, sum vit veiddu í árinum, sum fór, tá ið vit ásettu okkara egnu kvotu.

Norski parturin av heildarkvotuni er hin største, 61%, meðan Ísland, Rusland og ES fáa ávikavist 14,51, 12,82 og 6,51%.

## Í norskum sjógvi

Meðan eingin avtala var millum londini, kundu føroysk skip ikki fiska norðhavssild í norskum sjógvi, men nú avtalan er komin upp á pláss, kunnu vit fiska 39.000 tons av føroysku kvotuni í norskum sjógvi.

Í fjør veiddu føroysk sildaskip í føroyskum, íslenskum og altjóða sjógvi og eitt sindur við Svalbard, og hóast tey ikki sluppu í norskan sjógv at royna, megnaðu tey kortini at fiska sína kvotu av norðhavssild.



*Strandalondini eru nú aftur vorðin samd um norðhavsildina, og tað merkir, at sildin aftur verður veidd undir skipaðum viðurskiftum. Føroyski parturin er umleið hin sami, sum tonsini, vit veiddu í 2006*

*Mynd: FRS*